# Grikska ævintýrið fullkomið

**Mest óvæntaða úrslitið av einum EM-endaspæli nakrantíð er veruleiki. Grikska landsliðið, ið fáur hevði væntað fór at spæla seg víðari úr bólkaspælinum, vann sunnukvøldið finaluni á portugisisku vertunum og er tískil evropameistari**

EM-FINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Grikski liðskiparin, Teodoros Zagorakis, ið bleiv kostin til besta spælara í finaluni, hevur steyið sum tekin um, at Grikkaland er Evropameistari í fótbólti 2004*

Endabresturin í EM-endaspælinum gjørdist eitt sindur av einum fusara. Leikliga var dysturin langt frá tann besti í kappingini, men hinvegin var spenningurin stórur gjøgnum allan dystin, og einki var avgjørt fyrr enn dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð.

### Væl skipaðir grikkar

Eyðkenni fyri grikska liðið í EM-endaspælinum hevur verið, at liðið hevur verið so ómetaliga væl skipað. Allir mans kenna sín leiklut, og hvør sum ein arbeiðir allatíðina fyri liðið. Verður bólturin mistur í uppspælinum, eru allir mans skjótir at koma aftur um bóltin at verja fyri. Soleiðis var eisini í finaluni sunnukvøldið, og tað var týðuliga, at hetta ikki var nakað, ið dámdi portugisum. Hetta er nakað, sum hevur verið eyðkennandi fyri Grikkaland í allari kappingini, at teir hava verið so ómetaliga dugnaligir til at skifta millum álop og verju.

Portugal royndi at leggja trýst á grikkar frá byrjan, men tað gekk ógvuliga striltið hjá heimaliðnum at fáa glið á álopsspælið. Spælskiparin Deco úr Porto kom ongantíð av álvara inn í dystin, og tað var óivað skilagott av grikska venjaranum, Otto Rehagel, at hann í Konstantinos Katsouranis hevði ein yvirfrakka á júst Deco. Heimaliðið kom tó til nakrar einstakar møguleikar, uttan at talan var um teir heilt stóru, men tað skerst ikki burtur, at einsamalli áleyparin hjá Portugal, Pauleta, heldur ikki í finaluni hevði ein av sínum góðum døgum. Pauleta er vanliga ein sera vandamikil áleypari, men í EM-endaspælinum hevur tað als hepnast hjá honum, og Pauleta fekk einki mál í allari kappingini.

### Nikopolidis royndist drúgvur

Ein tann mest týðandi leikarin hjá grikkum er uttan iva málverjin, Antonios Nikopolidis, sum hevur verið sera stinnur í allari kappingini. Hóast hann ikki ger tað stóra burtur úr sær sjálvum, so roynist Nikopolidis ógvuliga drúgvur. Hann hevur havt fleiri frálíkar bjargingar, og Nikopolidis velur altíð tryggastu loysnina í sínum málmansspæli.

Í fyrra hálvleiki vóru tað portugisar, ið høvdu bóltin mest. Bólturin bleiv spældur runt á portugisiska miðvøllinum, men so skjótt teir nærkaðust grikska brotsteiginum kom stígur í. Hvørki Luis Figo, Deco ella Christiano Ronaldo fingu tað stóra burtur úr, og tað sæst beinan vegin aftur í álopsspælinum hjá Portugal, at júst hesir tríggir, ið eru mest skapandi leikararnir á liðnum, ikki fáa rásarúm til at spæla sítt spæl.

Áðrenn farið var til hálvleiks, noyddist heimaliðið at broyta upp á liðið hjá sær, tí at høgri bakkur hjá teimum, Miguel, fekk ein skaða, sum forðaði honum í at halda fram við at spæla. Hann bleiv tí skiftur út til fyrimuns fyri Paulo Ferreira.

### Charisteas griksk fólkahetja

Avgerandi løtan í dystinum kom stutt eftir steðgin. Portugal royndi framvegis at trýsta, men tær fáu ferðirnar, ið grikkar vóru frammi við portugisiska brotsteigin, tóktist nógv størri vandi verða á ferð. Tá ið knappir tólv minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, fekk Grikkaland hornaspark í høgru síðu. Miðvallarleikarin Basinas sendi væl innfyri, og heilt nær málinum var grikski álopsleikarin Charisteas hægri enn Costinha hjá Portugal, og Charisteas skallaði bóltin í tóma málið, tí portugisiski málverjin, Ricardo, var á heilt skeivari leið. Verjuleikarin Costinha bleiv beinan vegin eftir grikska málið skiftur út til fyrimuns fyri roynda spælskiparan Manuel Rui Costa, og veteranurin setti beinan vegin meiri ferð á álopsspælið hjá Portugal.

Heimaliðið legði nú stórt trýst á grikkar, og fleiri ferðir var heilt nær við, at teir fingu útjavnandi málið. Bæði Figo, Deco og Rui Costa royndu seg, men antin var ein grikskur fótur fyri, ella raktu teir ikki málið. Venjarin hjá Portugal, Luiz Felipe Scolari, royndi eisini at seta Nuno Gomes á vøllin í staðin fyri Pauleta seinasta korterið, men tað gav heldur einki úrslit. Tað nærmasta, ið portugisar komu einum útjavnandi máli, var, tá ið Luis Figo hevði eitt gott skot, sum rakti ein grikskan fót og streyk beint við síðuna av stongini hjá Nikopolidis í grikska málinum. Eisini ungi Christiano Ronaldo var nær við, tá ið hann fekk ein langan bólt frá Rui Costa, men Manchester United-leikarin fekk ikki nóg gott tamarhald á bóltinum, áðrenn grikkar fingu vart fyri.

### Apollon, Zeus og Rehagel

Leiktir vóru nærum fimm minuttir av yvirtíð, tá ið týski dómarin Markus Merk bríkslaði fyri seinastu ferð, og so kundu teir griksku leikararnir og teir mongu griksku áskoðararnir á Estadio da Luz fegnast um, at Grikkaland hevði vunnið Evropameistaraheitið í fótbólti 2004, og tað var tann fullkomni endin upp á grikska ævintýrið, sum byrjaði, tá ið grikska fótbóltslandsliðið fyri einum lítlum ári síðani vann sær rætt til at taka lut í EM-endaspælinum í Portugal.

Stóra styrkin hjá grikska liðnum hevur verið, at talan allatíðina hevur verið um eitt liðavrik. Liðið hevur ikki nakrar stórar stjørnur, og allir mans arbeiða fyri hvønn annan. Ikki minni týðandi hevur tað verið, at týski venjarin hjá liðnum, Otto Rehagel, hevur syrgt fyri, at grikkar eru ómetaliga væl skipaðir í sínum spæli, og so er Rehagel eisini kendur sum ein royndur venjari, ið dugir serstakliga væl at leggja taktikk eftir mótstøðuliðunum. Nú Rehagel hevur leitt grikkar til evropameistaraheitið, er tað eingin ivi um, at týskarin er ein gudur í Grikkalandi ájavnt við so kend nøvn sum Apollon og Zeus. Nógv hevur verið spátt um, hvussu fór at verða við Otto Rehagel aftaná EM-endaspælið, og millum annað hevur verið frammi, at hann skuldi yvirtaka týska landsliðið eftir Rudi Vøller, men Rehagel sigur sjálvur, at hann gott kundi hugsað sær at hildi fram í Grikkalandi, og tað hava grikkar neyvan nakað ímóti.

### EM FINALAN 2004

Estadio da Luz, Lissabon.
Portugal-Grikkaland 0-1 (0-0).
Mål: 0-1 Angelos Charisteas 57.
Dómari: Markus Merk, Týskland
Áskoðarar: 62.865

**Portugal: 4-5-1:**
Ricardo - Miguel/43. Paulo Ferreira, Ricardo Carvalho, Jorge Andrade, Nuno Valente - Costinha/60. Rui Costa, Maniche, Deco, Luis Figo, Cristiano Ronaldo - Pedro Pauleta/74. Nuno Gomes.

**Grækenland: 4-4-2:**
Antonis Nikopolidis - Yourkas Seitaridis, Michalis Kapsis, Traianos Dellas, Takis Fyssas - Stelios Giannakopoulos/77. Stylianos Venetidis, Theodoros Zagorakis, Angelos Basinas, Costas Katsouranis - Zisis Vryzas/81. Dimitrios Papadopoulos, Angelos Charisteas.



# EM-dreymaliðið

Nú EM-endaspælið er farið aftur um bak, hava vit her á blaðnum til stuttleikar sett eitt dreymalið mannað við teimum leikarum, ið vit meta hava staðið seg best í kappingini. Sjálvsagt eru tað ymsar meiningar um hetta, men her er so okkara boð upp á eitt EM-dreymalið í einari 4-3-3 uppstilling:

**Málverji:** Antonios Nikopolidis, Grikkaland. Hóast Nikopolidis seinasta hálva árið hevur havt trupulleikar við at vinna sær fast pláss í málinum hjá felagi sínum, Olympiakos, hevur Nikopolidis í hesum EM-endaspælinum av álvara prógva sítt virði. Við sínum róliga og trygga málmansspæli hevur hann verið grundarsteinurin undir trygga grikska verjuspælinum.

**Høgri bakkur:** Miguel, Portugal. Ungi bakkurin úr Benfica hevur verið mest støðugi verjuleikarin hjá Portugal, eftir at hann tók plássið frá Paulo Ferreira aftaná fyrsta dystin í kappingini. Í finaluni sunnukvøldið noyddist Miguel tó at fara av vøllinum fyri hálvleik við einum skaða.



*Christiano Ronaldo var ein ógvuliga vónbrotin maður eftir finaluna sunnukvøldið. Við sínum bert 18 árum hevur hann tó framtíðina fyri sær, og óivað fer hann at fáa møguleikan at royna seg í einari finalu enn einaferð*

**Miðverji:** Mihailis Kapsis, Grikkaland. Hann hevur spælt yvir fyri Milan Baros, Thierry Henry, Raul og Pauleta uttan at nakar av fyrr nevndu stjørnunum hevur fingið mál burturúr, og tað sigur ikki so lítið um avrikið hjá grikska miðverjanum úr AEK Athen. Kapsis hevur avgjørt verið ein av grundstuðlunum í stinna verjupartinum hjá griksku evropameistarunum.

**Miðverji:** Tomas Ujafalusi, Kekkia. Ujafalusi, sum til dagligt leikar í týska Hamburger SV hevur verið sera drúgvur á kekkiska liðnum, sum sýndi ein tann besti fótbóltin í EM-endaspælinum. Nógv fótbóltsmiðlar vilja verða við, at Ujafalusi í summar fer at skifta úr týska felagi sínum til italska Inter.

**Vinstri bakkur:** Ashley Cole, Ongland. Nógv høvdu vónað, at onglendingar fóru at koma langt í kappingini, men teir vóru steðgaðir ífjórðingsfinaluni, tá ið teir noyddust at lúta fyri Portugal eftir brotssparkskapping. Ein tann besti á enska liðnum í kappingini hevur verið Ashley Cole úr Arsenal, sum við sínum kvikleika og bóltførleika er stinnur bæði í verjupartinum, men eisini fram eftir vøllinum

**Vinstri miðvallari:** Pavel Nedved, Kekkia. Liðskiparin hjá kekkum, Pavel Nedvedúr italska Juventus, er uttan iva ein av heimsins bestu fótbóltsspælarum. Hann er motorurin á kekkiska miðvøllinum, og so er hann ein sera málsøkin miðvallari. Kanska hevði tað gingið øðrvísi hjá kekkunum í hálvfinaluni, um Nedved ikki noyddist av vøllinum við skaða fyri hálvleik.

**Miðvallari:** Maniche, Portugal. Bindiliðið á portugisiska miðvøllinum hevur uttan iva verið Maniche úr Porto. Á einum liðið, sum hevur havt rættuliga óstøðug avrik, hevur Maniche kanska verið tann mest støðugi leikarin av teimum øllum. Sum skilst hava fleiri ensk og italsk feløg sýnt honum áhuga seinastu vikurnar.

**Høgri miðvallari:** Christiano Ronaldo, Portugal. Ronaldo byrjaði fyrstu dystirnar á beinkinum hjá Portugal, tí at Simao bleiv tikin framum. Skjótt valdi portugisiski venjarin, Scolari, tó at býta um, og eftir at Ronaldo fyrst fekk møguleikan frá byrjan, var plássið hansara. Við sínum skjótleika og tekniska førleika er Manchester United-leikarin ein støðug hóttan fyri verjuna hjá mótstøðuliðnum.

**Áleypari:** Milan Baros, Kekkia. Eftir at hava verið skaddur størsta partin av undanfarna kappingarári, fekk Milan Baros úr Liverpool av álvara gjørt vart við seg í EM-endaspælinum, har hann gjørdist toppskjútti við fimm málum. Nú hann tykist verða komin fyri seg, verður tað spennandi at síggja samstarvið millum hann og Michael Owen.

**Áleypari:** Ruud van Nistelrooy, Holland. Eingin kann sum van Nistelrooy fáa mál burtur úr ongum. Hetta sást einabest í dystinum ímóti Týsklandi, har Manchester United-framherjin fekk javnað við einum ómøguligum máli stutt fyri leiklok. Kanska hevði van Nistelrooy verið enn betur í EM-endaspælinum, um hann ikki var so einsamallur í hollendska álopinum.

**Áleypari:** Wayne Rooney, Ongland. 18 ára gamli Everton-framherjin Wayne Rooney hevur fingið sítt altjóða gjøgnumbrot í EM-endaspælinum. Hóast sín unga aldur tykist Rooney ikki verða bangin fyri at bjóða stóru kanónunum av, og við sínum avriki í EM hevur hann skapt so stóran áhuga fyri sær, at Everton nú vil hava ein hálva milliard, um teir skulu selja hann

**Venjari:** Otto Rehagel, Grikkaland. Royndi týski venjarin, sum í sínari tíð sum venjari í Werder Bremen, vann fleiri týsk meistaraheitir, er óivað heilin aftan fyri grikska evropameistaraheitið. Rehagel hevur syrgt fyri, at grikkar nú eru eitt tað best skipaða liðið í altjóða fótbólti, og tað hevur ovurhonds stóran týdning.

Føroya Tele
heldur ídnaðarfrí
19. juli - 9. august




**Góðu viðskiftafólk**

Í summar flytir Føroya Tele í nýtt høvuðssæti í Klingruni. Í hesum sambandi halda vit ídnaðarfrífrá mánadegnum 19. juli til og við fríggjadagin 6. august – vika 30, 31 og 32.
Í hesum tíðarskeiði er virksemið á Føroya Tele munandi skert.
Er tørvur á ávísari tænastu ella ávísum arbeiði hetta tíðarskeið, er best at boða Føroya Tele frá sum skjótast.
Telebúðirnar hava opið sum vant.
Føroya Tele ynskir øllum eina góða summarfrítíð.

FØROYA TELE
www.tele.fo · tel 30 30 30